

## HALLÓ



# Michael Jensen

*(36) stjóri í MJ Catering*

**Nær byrjaði tú at lýsa við mati til jólaborðhaldini í ár?**
– Eg byrjaði at lýsa við tí um hálvan september. Onkur heldur kanska, at tað er alt, alt ov tíðliga, tí tað er so langt undan jólum. Men hetta var tó meiri at meta sum ein áminning, um at vera í nóg góðari tíð at bíleggja mat frá MJ Catering til ársins jólaborðhald. Fyrimunurin við okkara fyritøku er, at vit kunnu taka okkum av øllum, bæði matgerð, uppsetan, uppdekking, servering, reingerð, undirhaldi og øðrum.

**Hevur bitið á hjá tær?**
– Ja, tað hevur tað. Fleiri bíleggingar eru longu komnar til jólaborðhaldini í ár. Tær koma faktist úr øllum landinum. Men ikki tí, tað eru eisini tey sum bíleggja mat frá okkum eitt heilt ár frammanundan – tað vil siga longu beint eftir jólaborðhaldið í fjør.

**Nær er fyrsta jólaborðhaldið hjá tær í ár?**
– Tað fyrsta jólaborðhaldið er síðst í oktober mánaði, og síðani aftur fyrsta vikuskiftið í november. Og haðani frá koma tey so slag í slag, fleiri staðni sama kvøld.

# Eikin




Eik Banki í kreppustøðu

## Í MORGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og stundum regn og vánaligt sýnið. Hitin millum 10 og 13 stig.

## LEYGARDAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 974 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í útnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1011 hPa. við Írland fer eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Skotlandi fer norðureftir og brúgvalagið eystanfyri Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept Mánin longst frá jørðini
23. sept Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. sept | 06:40 | 18:58 | 05:40 | 17:58 | 05:55 | 18:13 | 08:40 | 20:58 | 09:40 | 21:58 | 04:55 | 17:13 | 03:55 | 16:13 | 06:55 | 19:13 | 07:55 | 20:13 | 06:25 | 18:43 | 07:40 | 19:58 |
| 23. sept | 07:16 | 19:33 | 06:16 | 18:33 | 06:31 | 18:48 | 09:16 | 21:33 | 10:16 | 22:33 | 05:31 | 17:48 | 04:31 | 16:48 | 07:31 | 19:48 | 08:31 | 20:48 | 07:01 | 19:18 | 08:16 | 20:33 |
| 24. sept | 07:51 | 20:09 | 06:51 | 19:09 | 07:06 | 19:24 | 09:51 | 22:09 | 10:51 | 23:09 | 06:06 | 18:24 | 05:06 | 17:24 | 08:06 | 20:24 | 09:06 | 21:24 | 07:36 | 19:54 | 08:51 | 21:09 |
| 25. sept | 08:28 | 20:47 | 07:28 | 19:47 | 07:43 | 20:02 | 10:28 | 22:47 | 11:28 | 23:47 | 06:43 | 19:02 | 05:43 | 18:02 | 08:43 | 21:02 | 09:43 | 22:02 | 08:13 | 20:32 | 09:28 | 21:47 |
| 26. sept | 09:07 | 21:27 | 08:07 | 20:27 | 08:22 | 20:42 | 11:07 | 23:27 | - | 12:07 | 07:22 | 19:42 | 06:22 | 18:42 | 09:22 | 21:42 | 10:22 | 22:42 | 08:52 | 21:12 | 10:07 | 22:27 |